# Spennandi føroyskt vikuskifti

**Meðan vit fáa eina føroyska lokaluppgerð sunnudagin, skulu Todi Jónsson og FCK vitja oddaliðið mánadagin**

Fótbóltur
*Jákup Mørk*

Frá einum føroyskum sjónarhorni tykist komandi vikuskifti at vera eitt av teimum spennandi í donsku superliguni.

## Føroysk uppgerð

Sunnudagin fara OB og Johan Byrial Hansen á vitjan hjá meistarunum úr Herfølge, har Jákup Mikkelsen sum kunnugt verjir málið.

Roknast kann við, at teir báðir føroyingarnir vera við frá fyrsta bríkslið, og fyri bæði liðini er alneyðugt, at ein sigur kemur undir land.

Herfølge hevur langt ífrá livað upp til meistaliga avrikið frá undanfarna kappingarárið, og niðurflytingarstrikan er í løtuni óhugnaliga nær. Eisini hjá OB er neyðugt við sigri, um teir skulu gera sær vónir um at fylgja við oddaliðunum. Eitt tap kann eisini viðføra, at OB fer at nærkast botnsessunum, og har hava liðfelagirnir hjá Johan verið alt ov ofta eftir egnari metan.

## Skulu uppeftir

AGF hevur havt tað alt annað enn lætt seinastu tíðina. Vánalig fíggjarlig eins og ítróttarlig avrik hava ført við sær, at tað nú rættiliga sansar at í fleiri mátar.

Fíggjarliga er tað kanska ikki so nógv, sum leikararnir kunnu gera, og so er spurningurin, hvat teir megna ítróttarliga. Sunnudagin kemur Lyngby, sum í løtuni er á øðrum plássi, á vitjan, og hetta boðar frá eini torførari uppgávu. Strykin hjá Lyngby hevur serliga verið álopsparturin, har teir í ár hava verið sera ágangandi, so um Óli sleppur at byrja á vøllinum, fær hann ivaleyst sítt at síggja til.

## Oddadystur

Nú er við tíðini vorðið nakað síðani, at FCK seinast var partur av eini oddauppgerð, men mánadagin skulu teir so aftur sleppa at royna hendan heldur óvanda leiklut.

Uppflytararnir úr FC Midtjyllan, ella FCM, hava higartil tikið øll á bóli, og tað er millum annað takkað verið einum sigri í Parkini, at teir nú eru á fremsta plássi í superliguni. Eitt tap, sum FCK ikki helt seg hava uppiborið, og sum teir nú vilja hava hevnd fyri.

Todi Jónsson slapp á vøllin seinastu tíggju minuttirnar undanfarna vikuskifti, og við tveimum málum boðaði hann venjaranum frá, at hann nú aftur er til reiðar at spæla.

Er hann skaðafríur telist Todi uttan iva millum teir fyrstu ellivu hjá Roy Hodgson, og so kunnu eisini føroyskir sjónvarpshhyggjarar kanna eftir, um formurin er í lagi. Í øllum teir hyggjarar, sum síggja rásina 3+, sum sendir dystin beinleðis mánakvøldið.

# Øssur í Onglandi

**Føroyski landsliðsleikarin, Øssur Hansen, er í hesum døgum í Onglandi, har hann í fyribils ein mánað skal royna seg hjá Oldham**

Fótbóltur
*Jákup Mørk*

Tað var um hetta mundi fyri einum ári síðani, at Øssur Hansen av fyrstan tíð fór til Onglands at royna seg.

Hann var tá í eina viku til royndarvenjingar hjá Oldham, men í fyrsta umfari spurdist tó einki burtur úr hesum venjingum.

## Tørvur á lámum

Heilt gloymdur eftir venjingarnar var føroyski spælarin tó ikki, tí í heyst hevur Oldham aftur sett seg í samband við hansara.

Felagið hevur fingið eina vánaliga byrjan upp á kappingarárið, og hetta hava sjálvandi verið fleiri orsøkir til.

Ein av hesum orsøkum hevur allar helst verið, at ov fáir lámar hava verið á liðnum, og hetta hevur felagið so gjørt nakað við nú.

Sjálvur er Øssur triði lámurin, sum nú kemur til felagið, og í fyrsta umfarið verður talan um eitt leigumál upp á ein mánað.

- Eg kundi helst fingið ein leigusáttmála, sum fevndi um eitt longri tíðarskeið, men eg vildi líka sum fyrst vita, hvussu eg fall til í nýggja umhvørvinum. Eru báðir partar nøgdir, er jú einki til hindurs fyri at leingja leigumálið, sigur Øssur Hansen við Sosialin.

## Hørð kapping

Enn hevur Øssur ikki roynt seg í dysti fyri nýggja felagið, men hann hevur so sæð, hvat skal til, fyri at vinna sær pláss á liðnum.

- Eg sá seinasta dyst teirra móti Wycombe Wanderers, og eg má siga, at okkara lið spældi væl. Teir vunnu 2-0, og tað, sum eg serliga beit merki í, var at leikferðin var sera høg.

- Enn havi eg ikki sjálvur roynt meg í dysti, men væntandi skal eg spæla við eykaliðnum um vikuskiftið. Eg skuldi annars spælt við eykamonnunum mikudagin, men tann dysturin varð útsettur, orsakað av regni, sigur Øssur.

Grundað á dystin móti Wycombe roknar hann við, at tað verður torført at



*Øssur Hansen er í løtuni hjá Oldham og roynir fótbóltsevni síni. Leigumálið er fyri fyrst galdandi í ein mánað*

sleppa á liðið, men vónleyst heldur hann tað kortini ikki vera.

- Vit hava vant sera nógv, einar tríggjar tímar um dagin, og tað hevur gingið hampuliga væl.

## Trívist væl

Eisini uttan fyri vøllin letur Øssur væl at umstøðunum. Hann greiðir frá, at umstøðurnar at venja eru av teimum allabestu. Í frítíðini tykist eisini alt at vera i lagi.

- Eg búgvi hjá eini familju her niðri, og eg havi bara gott at bera teimum. Um dagin eru tey til arbeiðis, men eg fái kortini tíðina at ganga, tá venjing ikki er á skránni. Gangi kanska ein túr í býnum, og sjónvarpsrásirnar eru nógvar, so har er eingin trupulleiki, sigur Øssur at enda.

Hvør veit. Teir føroyingar, sum síggja SkySports, hava hvørja viku høvi at síggja samandráttir úr triðbestu ensku deildini, har Oldham er eitt av liðunum, og møguliga verður Øssur at síggja á skýggjanum komandi tíðina.

# Hans Fróði og Julian verða uttanfyri

**Kurt Mørkøre verður í morgin einasti føroyingurin á liðnum hjá Sogndal. Mánadagin verður tað greitt, um Hans Fróði verður við í uppflytingardystunum, ella um hann er liðugur í Sogndal**

Fótbóltur
*Jóannes Hansen*

Seinnapartin í morgin fara áskoðararnir í Sogndal at fagna teirra spælarum fyri, at teir hava ognað sær bronsukrónurnar í næstbestu norsku deildini.

Dysturin ímóti Kjelsås hevur ongan týdning fyri endastøðuna hjá Sogndal. Tað er greitt, at teir skulu spæla um eitt pláss í bestu deildini. Tá dystirnir í bestu deildini eru av seinnapartin í morgin verður greitt, hvat lið fer at enda á triði aftasta plássinum í bestu deildini og harvið hvat lið skal spæla ímóti Sogndal.

Í morgin verður Kurt Mørkøre í álopinum hjá Sogndal. Kurt var leikbannaður, tá Sogndal síðsta sunnudag vann á útivølli ímóti Raufoss. Í morgin verður Julian Johnsson leikbannaður. Hans Fróði Hansen var skaddur síðsta sunnudag, og tað er greitt, at hann heldur ikki verður við í morgin.

Fyrri uppflytingardysturin verður longu mikudagin, og tann seinni verður leygardagin í komandi viku. Ivaleyst verða bæði Kurt Mørkøre og Julian Johnsson við í teimum dystunum. Støðan hjá Hans Fróða Hansen var í gjár meiri ivasom:

– Tað er ytra liðbandið í øðrum fótinum, sum er eitt sindur leyst. Eg havi ikki vant saman við liðfeløgunum, síðani vit komu aftur úr Sveis, men eg havi vant fyri meg sjálvan. Mánadagin skal eg til kanningar hjá læknanum. Tá verður avgjørt, um eg skal spæla í uppflytingardystunum. Eg fari bara at spæla, um skaðin verður burtur, so nú fáa vit at síggja, sigur Hans Fróði Hansen.

Skaðin kom undan fráferðini til Sveis. Landsliðslæknin og fysioterapeuturin arbeiddu alla tíðina við skaðanum. Undan dystinum roknaði Hans Fróði ikki við, at hann fór at spæla allar 90 minuttirnar. Men so varð Jens Kristian Hansen rikin av vøllinum, og tí bar tað illa til at skifta hin eftiransaran í miðverjuni út:

– Eg hevði nógva pínu, og tað var ikki serliga stuttligt, men tað eydnaðist at vera við alla tíðina. Eg haldi ikki, at skaðin gjørdist verri av landsdystinum. Men hann hevur verið so mikið meinur, at eg havi ikki fingið vant og spælt, og tað fari eg heldur ikki at gera í morgin. Um fótbóltsárið er liðugt, ella um eg sleppi upp í part í uppflytingardystunum verður avgjørt mánadagin, segði Hans Fróði Hansen í gjár.

Skaðin kann hava við sær, at Hans Fróði ikki fer at spæla aftur við Sogndal IL. Avgerðin um tað verður tikin mánadagin. Tað er í hvussu so er greitt, at Hans Fróði flytir til Føroya, tá uppflytingardystirnir um eina viku eru fingnir frá hondini.




Vit hava vetrardekk á goymslu í flest øllum støddum, við tí rætta prísinum.
Spyr fyrst hjá okkum. Vit senda um alt landið.

pf AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR
Fartelefon 214865

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898
Sosialurin - 311820

HURÐAR TIL BILHÚS



Hurðar til bilhús, størri bygningar og eisini skjóttgangandi hurðar til virkir
pf.KLEMENT PETERSEN
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60
Sosialurin - 311820



## Rentubroyting

Av tí at danski Tjóðbankin hevur hækkað discontorentuna til 4,75% pa. broytir Føroya Banki við gildi frá **20. oktober 2000** rentustigini á inn- og útláni.

**Innlán**
Rentan á innláni uttan uppsøgn verður óbroytt.
Rentan á innláni við uppsøgn verður hækkað sum niðanfyri víst.

| Saldo, 1.000 kr. | 3 mðr. | 12 mðr. |
|---|---|---|
| 0 - 100 | 3,75% | 4,25% |
| 100 - 300 | 4,25% | 4,75% |
| 300 - 1.000 | 4,75% | 5,00% |
| 1.000 - | 5,00% | 5,25% |

| | |
|---|---|
| Nósakonto | 5,25% |
| Nýtslu-Konto*IN* | 3,75% |
| Uppsparingar-Konto*IN* | 5,25% |
| Bústaðarkonto (+ 3% í stuðli) | 4,25% |
| 60-ára konto / Ratukonto | 5,75% |

**Útlán og kredittir**
Rentustigið á flestu útlánum - privatum sum vinnuligum - verður hækkað við 0,5 % - tó verður rentan á 1. veðrættarlánum til bústað *óbroytt*.

Fyri bústaðarlán er rentan henda:

| | |
|---|---|
| 1. veðrættur | 6,50-6,75% |
| Onnur bústaðarlán | 8,75-9,75% |

Rentan á billánum er 8,00-10,75% p.a. alt eftir útgjaldi.

Nærri upplýsingar um nýggju rentustigini fáast frá kundaráðgevum bankans.

FØROYA BANKI





## FM í virkisfótbólti 2000

Skipað verður fyri FM-kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 28. oktober frá uml. kl. 11 til uml. kl. 18.

**Reglur fyri kappingina**

- Spælt verður á hálvum vølli
- 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
- Flúgvandi útskiftingar
- Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í 1., 2., 3. deild ella í steypakappingini hjá FSF ár 2000
- Virki hava loyvi til at lána í mesta lagi tveir leikarar frá øðrum virki
- Leikarar kunnu bert leika á einum liði
- Hvørt virki kann í mesta lagi luttaka við 2 liðum
- Seinasta freist at boða frá luttøku er týsdagin 24. okt.
- Í mesta lagi 40 lið kunnu luttaka
- Luttøkugjaldið er 500,- kr. pr. lið, og gjaldast skal á staðnum áðrenn spælt verður.
- Vinnandi liðið fær steyp til ognar og nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerki.
- Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-piltum og smágentum 2001

Í B36-húsinum verður møguleiki fyri umklæðing, høli til "officials" og viðhaldsfólk v.m.
Okkurt til matna og at sløkkja tostan við verður at fáa undir og eftir dystirnar.
Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

Send til: B36 • FM í Virkisfótbólti 2000 • telefax 31 80 36

Navn á liði/liðum:

Arbeiðspláss:

Kontaktfólk:

Tel:



## Bilur til sølu



Um hóskandi bo› fæst, er hesin bilur til sølu.
OPEL Corsa 1,4 16 v. - 90 HK, árg. 05.98. Bilurin hevur bert koyrt 20.000 km og er sum n‡ggjur.

Áhuga› kunnu ringja á tlf. 313186, eftir kl. 18.00.